# Fleiri nýggj arbeiðspláss í Vági

**Høvdavirkið Faroes Apama í Vági byggir uppí, og um ein mánað veksur talið av arbeiðsfólkið úr 17 upp í nøkur og tjúgu**

VIRKSEMI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Samstundis sum nógvar fyritøkur minka um virksemi sítt, eru tað eisini onkrar, sum gera tað øvugta.

Ein teirra er høvdavirkið Faroes Apama í Vági.

Frá tí at virkið byrjaði at arbeiða í januar í fjør, hevur tað bara gingið ein veg, og tað er uppeftir.

Tað hevru gingið so mikið væl, at tey eru farin at byggja uppí virkið, og væntandi verður útbyggingin liðug hálvan mars, upplýsir Hildur Gunnarsdóttir, fíggjarleiðari.

Virkið er bygt upp við fimm klivum, og nú kemur ein aftrat.

– Orsøkin er tann einfalda, at marknaðurin í Nigeria hungrar eftir kotelettum av turrum fiski, sigur fíggjarleiðarin.

– Útbyggingin fær við sær, at virkið má hava fleiri starvsfólk. Sum er arbeiða har 17 fólk, og eftir útbyggingina væntar Hildur Gunnarsdóttir, at arbeiðsplássini verða 22-25.

Framleiðslan á Faroes Apama í Vági er tann sama sum á høvdavirkinum Faroe Marine Products í Leirvík, men hóast virkinum selja til sama marknað, er rúm fyri báðum. Eftirspurningurin eftir turkaðum høvdum, ryggum og uggum er størri enn so.

Nigerianar brúka turkaða fiskin til suppu. Teimum dámar tann ræsta smakkin av fiskinum úr Føroyum og úr Íslandi. Tað ber ikki til í Nigeria at turka fisk á sama hátt sum í Føroyum orsakað av veðurlagnum.

Tað gongur so mikið væl hjá Faroes Apama, at virkið væntar at flyta út fyri 18-20 mió. krónur í ár, sigur Hildur Gunnarsdóttir.



### Ynskja sær fleiri høvd

Einasti trupulleikin er, at tað gongur ikki nóg væl at fáa hendur á høvdum, ryggum og uggum.

– Vit hava avtalu við Sandoy Seafood, Delta og TG-Fish í Hvalba, og tey smáu virkini í Vági koma eisini við sínum til okkara, men vit kundu væl tikið ímóti meira. Tað er alt slíkt, ið kortini fer burtur, sigur Hildur Gunnarsdóttir.

– Virkið hevur eisini sum eina roynd tikið ímóti høvdum og øðrum frá Kósini, og tað hevur riggað væl.

– Arbeiðið á Faroes Apama hevur verið stútt. Fólkini hava fulla arbeiðsviku. Bara hendinga dagur er dottin burturímillum, sigur Hildur Gunnarsdóttir.





Send okkum tína
**bestu uppskrift**

**MÍN BESTA UPPSKRIFT**
er teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**

Thomas Dam búnýti

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
***mrk. uppskrift***

Ella til post@sosialurin.fo.

halt vikuskifti við Sosialinum
VIKUSKIFTI

Sosialurin 341800